# MENNISKJAÐ FÆR VIRÐI Á JÓLUM

– JESUSBARNIÐ SENDIR OKKUM EITT SIGNAL UM, AT VIT HÓAST ALT IKKI ERU SO GALIN, OG AT VIT HAVA EITT **VIRÐI**, SUM IKKI KANN TAKAST FRÁ OKKUM. MEN BARNIÐ Í KRUBBUNI HUGVEKIR IKKI FÓLK Á SAMA HÁTT LONGUR, SIGUR **JÓGVAN FRÍÐRIKSSON**, BISPUR. VIT HAVA HITT HANN TIL EITT **JÓLAPRÁT**



**SAMRØÐA**
Eydna Skaale
eydnaskaale@hotmail.com

– Jólagleðin er bæði eitt hugtak og ein verulig kensla. Men jólagleðin hevur einki við tað at gera, at man situr og flennir í kíki í dagavís, og tað er sum at vera í eini ævigari veitslu. Men jólagleðin er ein djúp ástøði og kann í grundini vera tað støðið, sum lívið byggir á.

– Vit hava tvey sløg av jólum. Fólkslig jól og kirkjulig jól. Tað fólksliga er deiligt og hugnaligt. Tað, at vit hitta hvønnannan, hava tað gott og eta ein góðan bita, skal til. Men tað, sum fyri mær er essensurin av jólunum, er tað, sum er rundanum kirkjuna. Eg dugi ikki at ímynda mær eini jól uttan einar 3-4 gudstænastur. Tí friðurin og sálmarnir geva nakað, sum ikki fæst aðrastaðni.

– Vit arbeiða nógv ígjøgnum árið. Vit resa og stressa eftir nógvum og ongum. Og eg haldi, at jólafriðurin og gleðin er har onkustaðni. Men man skal ikki romantisera jólini ov nógv, tí hjá summum er tíðin um jólini tann svárasta við sorg, sakni og tárum.

– Um vit ikki hava nakran annan boðskap við jólunum, enn at tað skal vera stuttligt og gott, so traðka vit heilt víst á kenslurnar hjá teimum, sum ikki megna hesa yvirfladisku gleðina. Tey, sum hava sorg og sakn. Jólini mugu tí hava ein djúpari boðskap enn bara ta yvirfladisku gleðina.

– Jólagleðin skal tí vera ein djúp gleði og ein friður. Og so løgið tað ljóðar, so eru tey glaðastu menniskjuni, eg havi møtt, fólk, ið eg havi møtt í sambandi við jarðarferðir. Tí tey høvdu ein djúpan frið við veruleikan og kundu gleðast um, at viðkomandi, sum farin var, var sloppin til eitt betri stað.

– Jólafriðurin snýr seg eisini um, hvussu leingi vit megna at sita púra úrkoblað í eini sofu og bara njóta lívið. Tað eru fá, sum klára at sita í friði; tey flestu mugu seta eitt lag frá. Og um man ikki prátar allatíðina, so halda fólk, at man er í ringum lag. Tað er eitt øgiligt óljóð rundanum okkum allatíðina, men á jólum hava vit møguleika at uppliva friðin. Tí gleðir tað meg so nógv at koma í kirkju. Ella í salin hjá brøðrunum, fyri tann saks skyld. Tað gevur ein frið at koma í Guds hús, har orðið verður boðað.

**Hvør er týdningarmesti boðskapurin á jólum?**

– Týdningarmesti boðskapurin á jólum er um Jesus, Guds son, sum gjørdist okkum líkur. Hann stendur nevniliga fyri eini menniskjansligari dimensjón, sum sigur, at vit øll hava eitt virði, og eingin skal traðka á tað. Jólini snúgva seg tí eisini um at kunna hvíla í okkum sjálvum.

– Eg eri hugtikin av myndini av Jesusbarninum í krubbuni, og at tað var ein moyggj, sum átti ein son. Men um vit eru heilt erlig, so verða tað færri og færri, sum verða hugvakt av einum barni í eini krubbu. Tað skal nógv meiri til í dag. Tí er tað ógvuliga týdningarmikið, at kirkjan, sum prædikar um Jesus, sum kom og varð hold, so at siga eisini verður hold, og tekur tann menniskjansliga eksistensin í álvara í síni breidd og sínum vævi, soleiðis, sum hann lagar seg fyri okkum menniskju.

> » Eg eri hugtikin av myndini av Jesusbarninum í krubbuni, og at tað var ein moyggj, sum átti ein son. Men um vit eru heilt erlig, so verða tað færri og færri, sum verða hugvakt av einum barni í eini krubbu

– Jesusbarnið sendir nøkur signal, sum siga, at vit kanska ikki eru so galin, tá alt kemur til alt. Við Jesusi er tað onkur, sum møtir okkum í okkara verð, har vit eru júst nú. Og tað eigur kirkjan at boða. Ofta hevur kirkjan sent út negativ signal, men á jólum eiga vit at taka time-out og bert boða tað góða.

– Í Føroyum eru nógv fólk, sum ikki eru kristin, og eisini fólk, sum als ikki siga seg trúgva nøkrum. Jólini eru ein upplagdur møguleiki til at boða tað góða, tí fólksligu jólini eru ein góður felagsnevnari, sum savnar okkum øll.

– Vit síggja eisini nógva staðni, har tað er kríggj, at tað er vápnahvíld á jólum. Jólini eru ein gyltur møguleiki bæði í politikki og innan religión at leggja stríðsøksina, kveikja ein loga, merkja friðin og kenna fløvan. Tað er ikki so lætt, men tað eigur at lata seg gera.

**Hava handilsjól og vættrar troðkað einglar og Jesusbarnið burtur?**

– Ja, tað er blivið alvorliga kommersielt. Í einum donskum jólasangi syngur Shu Bi Dua um, at Jesus er føddur á aðru hædd í Magasin. Vit keypa jú yvir evni á jólum, og eg haldi eisini, at tað er við til at minka um friðin.

– Tað er gott at keypa eitt sindur, tað skal jú til, men heilt ærliga: hvat skulu damurnar gera við allar hesar høgu leðurstivlarnar, sum bert verða brúktir tvær ferðir? Og vit menn, vit keypa ▶